gult22 cyan22 magenta22 svart22



## Nógvar framsýningar

Tað verða nógvar framsýningar at fara til á norðoyastevnu. Summar eru afturvendandi, meðan aðrar eru nýggjar.

Stóra listaframsýningin er fastur táttur á stevnuni, og í ár verður framsýningin í skúlanum við Ósánna. Á framsýningini verður eisini modell av skonnartini Polarfarið, sum Hans Jacob Fuglø hevur gjørt, sýnt fram.

Norðoya Fornminnasavn hevur framsýning um ull í sínum egnu hølum, Norðoya Fotofelag hevur framsýning av myndum í Kunningarstovuni, og í skótahúsinum, Uppistovu, verður framsýning av modellbilum og motorsúkklum.



# Lykilin er dygd

**– Gert tú eitt gott arbeiði, so fært tú eisini nógvar uppgávur, sigur Jastrid Gullaksen, sum hevur arbeitt sum grafiskur designari í Klaksvík í fleiri ár. Nú hevur hon gjørt nýtt grafiskt virki saman við Gunvu við Keldu**



*– Tað tykist sum fleiri og fleiri fyritøkur vilja gera meiri burtur úr sær sjálvum við faldarum, lýsingum og øðrum. Bara síðani eg byjaði, er ein stór broyting hend í Klaksvík, sigur Jastrid Gullaksen, sum nú hevur gjørt nýtt grafiskt virki saman við Gunvu við Keldu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

GRAFIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Grafiska vinnan stórtrívist í høvuðsstaðnum. Nógv virki og fólk starvast innan hesa vinnu, og útbúgvin fólk hava ongar trupulleikar við at fáa starv.

Tað hevði heldur ikki verið nakar trupulleiki hjá Jastrid og Gunvu at farið til arbeiðis í Havn, men tær hava valt at fara aftur til heimstaðin og gera sítt egna virki, sum tær kalla Vasti.

Jastrid er útbúgvin grafiskur designari, og Gunvá er grafikari og hevur eisini tikið útbúgving innan leiðslu og fíggjarstýring.

– Tað ber væl til at hava eitt slíkt virki í Klaksvík, hóast mesta virksemið innan hesa vinnuna higartil hevur verið í Havn. Gert tú eitt gott arbeiði, so fært tú eisini nógvar uppgávur, sigur Jastrid Gullaksen, sum hevur arbeitt sum grafiskur designari í Klaksvík í fleiri ár.

### Samskifti um netið

Gunvá við Keldu hevur starvast nógv á bløðunum í Havn, men nú er hon flutt til Klaksvíkar at arbeiða.

– Tað kann eisini verða ein fyrimunur, at okkara virki liggur uttan fyri Havnina. Vit eru ikki í sama umhvørvi, og tað kann koma okkurt gott burturúr tí, heldur Gunvá.

Jastrid Gullaksen hevur havt Grafiskt Design í fleiri ár, og tað heldur Gunvá hevur verið við at bróta upp úr nýggjum. Nú fara tær saman um nýtt virki, og viðskiftafólk hava tey kring alt landið.

– Tað er eingin trupulleiki at arbeiða í Klaksvík, hóast tú hevur kundar í Havn ella í Eysturoynni. Tað ber til at samskifta umvegis netið, og tað verður nógv brúkt, sigur Jastrid.

– Tá tú ert komin at kenna tínar kundar, og teir hava fingið álit á tær, so ber tað vil til at samstarva fyri tað um annar er í Havn og hin í Klaksvík, sigur hon.

### Broyting hend í Klaksvík

Vasti hevur móttøku fríggjadagin, men tær hava verið í gongd síðani 1. apríl, og nógv er at gera. Norðoyastevnan skapar eisini ein ávísan tørv.

– Tað eru nógvar smáar uppgávur her í Klaksvík áðrenn norðoyastevnuna. Handlar og fyritøkur skulu hava ymiskt klárt til stevnuna, og tað hjálpa vit so teimum við, sigur Gunvá.

Síðani Jastrid Gullaksen fór undir sítt virki í Klaksvík er nógv broytt.

– Tað tykist sum fleiri og fleiri fyritøkur vilja gera meiri burtur úr sær sjálvum við faldarum, lýsingum og øðrum. Bara síðani eg byjaði, er ein stór broyting hend í Klaksvík, sigur Jastrid.

Og so er tað tann upplagdi spurningur. Hvat merkir Vasti?

Og svarið er, at Vasti merkir vakurleiki, og navnið er eisini eitt spæl við bókstavunum í nøvnunum hjá Gunvu og Jastrid.

# Nøgdur við skránna



*Jan Gardar, formaður í NFÍ, er væl nøgdur við skránna á norðoyastevnuskránna, men tað slepst ikki undan, at onkur stór tiltøk renna saman*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Formaðurin í Norðoya Ítróttar- og Frítíðarráð er væl nøgdur við norðoyastevnuskránna**

STEVNUSKRÁ
*Eyðun Klakstein*

Ársins norðoyastevnuskrá líkist sær sjálvari. Har eru afturvendandi tiltøk, sum vertir og gestir hava vant seg við.

Men onkur nýggj tiltøk eru eisini á skránni, og vitjanin av heimsins besta telvara, Garri Kasparov, fer eisini at verða ein stórhending á stevnuni.

– Vit eru væl nøgdir við skránna. Sjálvandi eru nógv afturvendandi tiltøk, men soleiðis er við øllum stevnum. Men tað eru eisini onkur nýggj tiltøk á skránni, sigur Jan Gardar, sum er formaður í Norðoya Ítróttar- og Frítíðarráð (NFÍ). Tað er NFÍ, sum samskipar norðoyastevnuna.

– Kasparov kemur á vitjan, nýggjar og spennandi framsýningar eru á skránni, og so er bjargingarroyndin komin aftur á skránna.

– Tað kann eisini fáa týdning, at kappróðurin í Klaksvík kann fara at gera seg galdandi. Tað kann gera stevnuna stuttligari, sigur Jan.

### Børnini skuldu fingið meiri

Jan Gardar letur væl at arbeiðnum við skránni. Stríðið er sjálvandi at samskipa tey mongu tiltøkini, og hetta hevur eydnast væl.

– Tá tað eru so nógv stór og góð tiltøk, so slepst ikki undan, at summi tiltøk renna saman. Leygardagin er til dømis bjargingarroynd og vitjan hjá Kasparov í senn, men soleiðis eru treytirnar, sigur Jan Gardar.

Bæði børn og vaksin hugna sær á ársins fyrstu veruligu summarstevnu, og formaðurin heldur, at fleiri tiltøk áttu at verið til børn.

– Vit hava tivoli, ponyríðing, hoppiborg og okkurt annað, men tað hevði verið stuttligari við fleiri tiltøkum til børn, so tey rættiliga kundu hugna sær á stevnuni, heldur Jan Gardar.

gult23 cyan23 magenta23 svart23







DESIGN.FO
VASTI

Í sambandi við at vit hava stovnað nýtt grafiskt virki verður

**Móttøka**

fríggjadagin 8. juni frá kl. 14[00] til 18[00]

Niðan Horn 2 - FO-700 Klaksvík - Tel. 457171 - Fax 457073
design@design.fo

Jastrid Gullaksen Gunvá við Keldu

Móttøka

***Anna Højgaard og Boði Haraldson:***
*"Vit gleða okkum at seta føtur undir egið borð. Tá vit skuldu byggja, tóku vit lán í Føroya Banka. Vit hava fingið eina góða ráðgeving, soleiðis at vit ikki sita fyri meira, enn vit klára, og ikki koma illa fyri av óvæntaðum útreiðslum."*



"Tað ræður um at velja rætt
- tí valdu vit Føroya Banka"

**Visti tú,** at um tú ert viðskiftafólk hjá Føroya Banka, so hevur tú tín egna persónliga ráðgeva?

Hann ráðgevur um øll tíni fíggjarligu viðurskifti, serliga tá tað snýr seg um sethúsafígging, lán við trygging, samlagstrygging, sethúsa- og familjutrygging og biltrygging.

Hetta hevur bankin gjørt fyri at laga virksemið eftir tínum tørvi. Bankin setur seg inn í tína støðu, soleiðis at tín gerandisdagur kann gerast lættari, betri og bíligari.

Ætlar tú at seta búgv ella hevur sett búgv og ætlar at umbyggja, er Føroya Banki rætti bankin at tosa við.

Føroya Banki kann bjóða tær dygdartænastur fyri kappingarførar prísir.

FØROYA BANKI